Vikuskifti

Nr. 100 • fríggjadagur • 26. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gamla Norrøna er enn í Føroyum

Í einum túni í Sørvági stendur ein partur av gomlu Norrønu. Tað er ein reyður bjargingarbátur, sum nú verður gjørdur um til fiskibát

GAMLA NORRØNA
*Orð & mynd: Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Bjargingarbáturin er bygdur í 1973 og varð vrakaður áðrenn gamla Norrøna varð seld av landinum. Sum bjargingarbátur tók hann heili 37 fólk.

Jan Jacobsen keypti bátin í november 2005 og hevur síðani tá arbeitt við at gera bátin um til fiskifar.

– Eg havi keypt mær ein gamlan føroyskan bát, sum eg taki motor, pumpu, róður og annað úr og seti inn í hendan bátin, sigur Jan.

Hann er sjómaður og arbeiðir sum stýrimaður í reiðarínum ESvagt. Tað inniber, at hann er burtur ein mánað og heima ein mánað. Mánaðin hann er heima brúkar hann nógva tíð upp á bátin.

– Hetta er eitt útmerkað frítíðarítriv hjá einum sjómanni, sigur Jan. Inni í garaguni hevur hann teknað eina mynd av, hvussu báturin skal síggja út, tá hann verður liðugur.

– Eg ætli mær at behalda uppruna litin, sum er reyður, sigur hann.

Á síðuni á bátinum stendur tað við svørtum litum »Norrøna, Tórshavn«, hetta verður skift út við »Elsa«, tá báturin er liðugur. Tað er navnið á yngstu dóttur Jan.

Hann hevur júst nú fingið húsið upp á bátin og vónar at fáa hann á sjógv næsta ár.

– Eg fari nokk at brúka hann mest sum fiskibát og til stimitúrar út eftir Sørvágsfirði, sigur hann at enda.



*Soleiðis fer báturin at síggja út tá hann er liðugur.*



*Bjargingarbáturin frá gomlu Norrønu verður nú bygdur um til fiskibát.*




*Jan Jacobsen hevur tað sum frítíðarítriv at byggja bjargingarbátin um til fiskifar*

Petur Skeel Jacobsen um vikuskiftisveðrið:

## Gott norðoyastevnuveður



Vikuskiftið byrjar við regni, men endar við sól. Soleiðis kann ein taka samanum vikuskiftisveðrið.

VEÐUR
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur sigur, at við kunnu vænta okkum eitt sindur av regni í nátt og ímorgin ári, men at tað síðani slítur í og verður turt restina av vikuskiftinum.

– Sólin fer nokk eisini at síggja, og tað verður eitt sindur lýggjari, um 12-13 stig, sigur Petur.

Sunnudagurin verður turt.

– Hann er eystan í ættini, so tað burdi verði gott í Klaksvík.

**Kunnu vit vænta meiri kava?**

– Tað veit man ongantíð, um hann verður høgur í ættini aftur. Tað er ikki óvanligt, at fjøllini eru hvít allan juni, sigur Petur Skeel Jacobsen at enda.